# Plátufelagið Tutl 25 ár á baki

**Skrivað hevur Kári Sverrisson.**
**Heimild: Kristian Blak.**
**www.tutl.com**
**tutl@post.olivant.fo**

Í 2002 er fjórðingsøld liðin síðani Plátufelagið Tutl sá dagsins ljós. Hetta fer at verða hátíðarhildið alt komandi árið, millum annað við hópin av konsertum, bæði í Føroyum og uttanlanda. Men hvussu byrjaði virksemið hjá Tutli?



### Byrjanin á útgávuvirkseminum

Tað var í 1975 at Havnar Jazzfelag varð stovnað. Hetta var eitt felag, sum m.a. skuldi hava til endamáls at skipa fyri jazztónleikatiltøkum. Tiltøkini vóru mong í tali og áhugin fyri livandi tónleiki var stórur bæði millum áhoyrarar og tónleikarar, so burturúr hesum virksemi spratt sum vera man eisini hugurin at festa nakað av tónleikinum á band og síðani geva hann út á plátu. Heitt varð á Milson Zachariassen um at taka sær av fyrstu upptøkunum og tær vóru við spælimansbólkinum »Spælimonnunum í Hoydølum« og við jazzbólkinum »Kræklingum« við Holgeri Laumann, danska saxofonleikaranum, sum var og vitjaði í Føroyum. Upptøkurnar vórðu gjørdar í januar 1977 og komu út á tveimum plátum stutt eftir. Tann við »Spælimonnunum« var ein lp-pláta við frámerkinum SHD 1, ið var stytting fyri Spælimenninar í Hoydølum. Tey, ið spældu á útgávuni, vóru Jógvan Dahl, Magnus Pauli Poulsen, Christina Lindén, Jan Danielsson, Alistair Cochrane, Hans Ole Larsen og Kristian Blak. Permumyndina átti William Heinesen. Plátan við »Kræklingum« og Holgeri Laumann var ein single-pláta við frámerkinum HJF 1, ið var stytting fyri Havnar Jazzfelag. Seinni sama árið kom lp-plátan »Jazz í Føroyum« og barnaplátan »Nu ska vi u å sejle« hjá Kristiani Blak. Árið eftir komu aftur 4 plátur; »Umaftur«, ið var hin næsta hjá »Spælimonnunum í Hoydølum«, »Fjand«, ið var ein pláta við jútska spælimanninum Svend Bjerg og øðrum, »Jazz í Føroyum 2« og hin ógvuliga væl umtókta »Vælferðarvísur« hjá Kára P.

### Navnið Tutl

Tað var tó ikki fyrr enn eini tvey ár seinni at navnið Tutl varð brúkt um útgávufelagið. Tað var Rannvá Simonsen, sum nú er búsitandi í Kanada, ið hevði navnið TUTL sum uppskot á nevndarfundi heima hjá Tróndi Djurhuus, ið tá var formaður í Havnar Jazzfelag. Í Jazztíðindum, málgagninum hjá Havnar Jazzfelag, stóð at lesa í apríl 1980: »Um stutta tíð kemur á marknaðin nýggj LP; Brongl »Ein Roynd«, givin út av Plátufelagnum TUTL.« Brongl var ein bólkur ella kanska heldur ein verkætlan hjá Jóhannusi á Rógvu Joensen og »Ein roynd« var sostatt fyrsta útgáva, sum Tutl stóð fyri og ikki Havnar Jazzfelag (HJF) ella SHD, ið var eitt slag av »systurfelag«, sum gav út spælimans- og fólkatónleik, sum tað stóð í Havnar Jazztíðindum í november 1978. Talan var tó um eitt og sama felag og bókstavirnir HJF og SHD verða enn nýttir sum frámerki ella skrásetingarbókstavir á Tutl-útgávum.

Síðani hevur virksemið hjá Tutli verið støðugt og vaksandi og hevur fevnt um útgávur við øllum hugsandi sløgum av tónleiki. Í dag eru ikki færri enn 165 útgávur, sum Tutl umboðar, og seinastu árini hava útgávurnar verið millum 10 og 20 á hvørjum ári.

### Konsertvirksemið

Tá ið forlagið fekk egið navn, bjóðaði felagið frá fyrsta degi limunum at spæla á konsertum. Hetta var ikki í stríð við Havnar Jazzfelag, sum var mannað við somu fólkum og sum í tíðarskeiðinum 1977-83 skipaði fyri ikki færri enn tveimum til trimum konsertum um vikuna, men var gjørt fyri at geva sjálvum útgávunum serliga umrøðu. Í fleiri ár í áttatiárunum hevði Tutl m.a. regluligar konsertir í Mettustovu úti á Reyni, serliga um sumrarnar, har tutl-útgávur vóru til sølu. Tað var eisini Tutl, ið tók stig til fyrstu Ólavsøkukonsertirnar. Hesar vóru í Gundadali í 1981 og á Glasheyggi í 1982. Fleiri túsund áhoyrarar vóru til konsertirnar. Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT) yvirtók skjótt Ólavsøkukonsertina og hevur staðið fyri henni síðani. Í árunum frá 1995 til 1997 skipaði Tutl fyri konsertrøðini »Rock í Føroyum«.

Tutl hevur í dag samstarv við feløg sum Grót, Jazzfelagið, Høganes, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroya Tónleikarafelag og stovnar sum Føroya Landsstýri, Listaskálan og Norðurlandahúsið. Harumframt hevur Tutl samband við bólkar, ið hava áhuga í at ferðast við tónleiki sínum, og teir hava verið víða um. Lond, har bólkar og einstaklingar, ið hava givið út á Tutli, hava havt konsertir eru Grønland, Kanada, USA, Argentina, New Zealand, Frakland, Belgia, Týskland, Eysturríki, Bulgaria, Italia, Bretland, Noreg, Svøríki, Ísland, Russland, Sámaland, Finnland, Estland, Lettland, Danmark og Litava.

Í ár hevði bólkurin Ivory við Eivør Pálsdóttir størstu ferðaskrá. Bólkurin hevði konsertir í Fraklandi, Danmark, Eysturríki og USA.

Tutl hevur síðani 1997 verið á nógvum altjóða tónleikamessum, og hetta hevur havt ein ávísan týdning fyri søluna og útbreiðsluna av føroyskum tónleiki, umframt at Tutl í dag hevur eitt rættiliga stórt net av fjølmiðlum og konsertstøðum kring allan heim at samstarva við. Tutl hevur eisini í nøkur ár havt sølu á alnótini.

### Tutl 25 ár

Í sambandi við »føðingardagin« komandi ár verður, sum áður nevnt, skipað fyri konsertum við tónleikarum, ið antin hava givið út á Tutli ella fara at geva út í framtíðini.

### Januar-februar:

Byrjað verður við eini rokk-konsertrøð í januar mánaði. Fyrsta konsertin verður á Glyvrum 10. januar við bólkunum Týr og Clickhaze. Onnur konsertin verður á Tvøroyri 11. januar við Týr, Clickhaze og Hatespeech. Triðja konsertin verður í Norðurlandahúsinum 12. januar við Týr, Mold, Clickhaze, 200 og Hatespeech.

Seinni í januar kemur finski saxofonleikarin Eero Koivistoinen at hava konsertir saman við Edvardi Nyholm Debess, ið spælir kontrabass, Magnusi Johannesen, ið spælir klaver, Brandi Jacobsen, ásláttur, og Rógva á Rógvu, ið spælir trummur. Ætlanin er seinni at taka tónleikin upp og geva hann út.

Í døgunum frá 29. januar til 20. februar verður bólkurin »Shalder« (ið merkir tjaldur á hetlendskum) at hoyra á konsertferð í Argentina á Suðuramerikanska meginlandinum. Teir, ið manna bólkin, eru Heðin Ziska Davidsen, Kristian Blak, Mikael Blak og Brandur Jacobsen. Afturat teimum verða saxofonleikarin Ricardo Villar og aðrir argentinskir tónleikarar. Tónleikurin, ið »Shalder« spælir, er ein blandingur av nútímans jazztónleiki og føroyskum skjaldraløgum og hetlendskum spælimanstónleiki.

### Mars:

Í mars mánaði vera konsertir ymsastaðni í Føroyum við klassiskum tónleiki, ið føroysk tónaskøld hava skrivað. Tað verður »Aldubáran«, ið fer at framføra hesi verk.

### Mai:

Í mai mánaði eru ætlanir um uppaftur fleiri konsertir. Hin fyrsta verður í Norðurlandahúsinum 4. mai við bólkinum »Í Eb-inum«, ið framførir nýggjan tónleik hjá Heðini Ziska Davidsen, ið spælir el-gittar í bólkinum. Óli Olsen spælir klaver, Mikael Blak spælir kontra-bass og Brandur Jacobsen trummur.

12. mai verður aftur konsert í Norðurlandahúsinum. Hesaferð við tveimum bólkum. Annar er »Faroeesti«. Sum navnið sipar til, er »Faroeesti« mannaður við føroyskum og estlendskum tónleikarum. Í bólkinum eru Villu Veski, saxofon, Edouard Akulin, trombon, Heðin Ziska Davidsen, gittar, Kristian Blak, klaver, Jóhannus á Rógvu Joensen, bass og Tanel Rubin, trummur.

Hin bólkurin er ein bólkur, ið verður settur saman í sambandi við at skotski harmonikuúrmælingurin Sandy Brechin vitjar enn einaferð. Teir, ið fara at spæla saman við honum, eru Heðin Ziska Davidsen, gittar, Mikael Blak, kontrabass, og Brandur Jacobsen, trummur.

Í døgunum frá 18. til 22. mai fara »Spælimenninir« at ferðast runt í Føroyum og hava konsertir, síðani verður farið til Orknoyar, har bólkurin í døgunum frá 23. til 26. mai verður við á Orkney Folk Festival. Tey, ið manna »Spælimenninar«, eru Jan Danielsson, fiól, Erling Olsen, fiól, Sharon Weiss, blokkfloytu, Ívar Bærentsen, mandolin og gittar, Kristian Blak, klaver og Charlie Pilzer, kontrabass.

Alt summarið, frá 3. mai til 30. juli vera hellukonsertir undir Hestoynni og/ella Nólsoynni. Sum undanfarnu ár verður siglt út til helluni við »Norðlýsinum«. Á skránni er nógvur og fjølbroyttur tónleikur við bæði føroyskum og útlendskum tónleikarum.

### Juni-juli:

Í juni ella juli vera konsertir við bólkinum »Yggdrasil« saman við Eivør Pálsdóttir. »Yggdrasil« er ein norðurlendskur bólkur, sum hevur spælt síðani 1981. Hetta hevur serliga verið skrivaður tónleikur hjá Kristiani Blak og annars improviseraður tónleikur. Higartil eru 7 jazz suitir hjá Kristiani útkomnar við bólkinum. Tey, ið hava verið við í bólkinum, eru Ernst Dalsgarð, tvørfloytu, Anders Hagberg, tvørfloytu og saxofon, John Tchicai, saxofon, Sharon Weiss, blokkfloytu, Tore Brunborg, saxofon, Ólavur Øster, gittar, Lennart Kullgren, gittar, Kristian Blak, klaver, Anders Jormin, kontrabass, Yasuhito Mori, kontrabass, Karin Korpelainen, trummur og Christian Jormin, trummur.

Í summar verður bólkurin mannaður við Andersi Hagberg, Andersi Jormin, Tore Brunborg, Kristiani Blak, Brandi Jacobsen og Eivør Pálsdóttir. Tey vera eisini saman nakrar dagar nú í desember mánaði í einum upptøkuhølum í Gøteborg, har tey taka nýggjan tónleik upp. Upptøkurnar koma væntandi á fløgu einaferð komandi vár.

### Tónleikastevnur summarið 2002

Umframt á teimum serligu konsertunum frá januar til juli, ið verða fyriskipaðar sum »Tutl 25 ár«-konsertir, vera bólkar, ið geva út tónleik á Tutli, eisini at hoyra á føroysku festivalunum í summar; »Grannastevnu« (23.-25. mai), »Summartónum« (17.-23. juni), »Tórshavnar Jazz-, fólka- og bluesfestivali« (3.-7. juli), »Fólkatónleikarstevnuni« (17.-22. juli) og »Listastevnu Føroya« (3.-18. august).

### Útgávur í 2002

Tað eru tónleikararnir sjálvir, ið eiga Tutl, og sum meir ella minni avgera hvussu nógvar útgávur koma út og nær. Hvørjar útgávur koma komandi ár er enn óvist, tó vera »Den Yderste Ø« og »Ravnating«, hin fyrra, at fáa sum ljómfløgur í 2002, Øssur Johannesen og Hjalti Joensen koma við eini improvisatiónsfløgu í januar, »Yggdrasil« saman við Eivør Pálsdóttir geva út fløgu og nýggjur føroyskur klassiskur klavertónleikur verður eisini útgivin komandi ár. Uttan iva vera fleiri aðrar nýggjar Tutl-útgávur í komandi árinum.

**Fyrsta útgávan:**

"Spælimenninir í Hoydølum", 1977

"Vælferðarvísur" hjá Kára P., 1978

"Gluggamynd" hjá "Glataðu Spælimonnunum", 1984

"Allar ættir", Plúmm og Holger Laumann, 1991

"Debazz" hjá Edvardi Nyholm Debess, 2000

"Eivør Pálsdóttir", 2000



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**BÝARARKITEKTUR**

Tórshavnar kommuna søkir eftir býararkitekti at byrja skjótast til ber.

Býararkitekturin er, við tilvísing til tekniska stjóran, leiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini, sum m.a. fevnir um planlegging, lendisumsiting, byggimál og húsaumsiting.

**Høvuðsuppgávur**
Deildarleiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini
Planlegging, projekt og ymiskar ætlanir.
Veita serkøna hjálp innan- og uttanhýsis.
Fíggjararætlanararbeiði.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava arkitektaútbúgving frá góðkendum arkitektaskúla og hava drúgvar royndir innan arkitektafakið.

Neyðugt er at duga væl føroyskt í skrift og talu og hava førleika til Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt tekniprogram Cad og/ella MicroStation.

**Persónligir eginleikar**
Kommunan roknar við, at umsøkjarin:
- hevur hugflog og skapandi gávur við atliti til at menna býin,
- dugir væl at leggja arbeiði til rættis og at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis, umframt at verða fyrikomandi og kunna arbeiða sjálvstøðugt,
- gongur á odda, er sjónligur, opin og motiverandi,
- hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og til reiðar at taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Arkitektafelagið og Fíggjamálastýrið við eini viðbót sum yvirarkitektur á 17. stigi.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. januar .2002. Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

SNARSKIVAN

*Vit ynskja vinum og viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár við tøkk fyri tað skjótt farna*

**Viggo A. Hansen Sp/f**

P.S. Vit hava stongt 21.12. til 07.01. báðar dagarnar íroknaðar.







